# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Minningarhald fyri deyð børn

MINNINGARGUDS-TÆNASTA
*tíðindaskriv*

Fyrsti sunnudagur í november er, sum flestum kunnugt, Alla Halganna sunnudagur. Flestu kirkjurnar í Føroyum minnast hendan dagin tey fólk, sum doyðu á sjónum í farna árinum.

Felagið Pinkubarnadeyði tók stig til slíka gudstæntastu á fyrsta sinni í 1997. Undirtøkan var somikið góð, at valt varð at gera hetta sum ein vakran og afturvendandi sið, har øll kunnu minnast deyða sítt. Líkamikið nær og hvørjum sambandi barni doyði.

Soleiðis er hetta áttanda árið, at felagið kann bjóða foreldrum og avvarðandi til minningarhald, og verður hetta sunnudagin, 7. november, í Dómkirkjuni í Havn.

Tá við missa eitt barn, missa vit ein part av okkum sjálvum. Ein part av okkara framtíð og ein part av okkara samleika. Vit náddu at knýta sterk bond til børn okkara, annað hvørt tey vóru fødd ov tíðliga, til tíðina, ella um vit hava livað saman við teimum.

Saman við børnunum í familjuni minnast vit tey deyðu børnini við einum dámi av góðsemi og fløvan. Einum siði við ritualum, ið er við til at binda bond millum fortíð og framtíð.

Minningarhaldið verður sum vanlig gudstænasta. Tað verður møguleiki hjá teimum, sum hava hug til tess, at tendra eitt ljós fyri tí barnið, ið farið er.

Felagið Pinkubarnadeyði heldur til Jákupsstovu í J. Paturssonargøtu 24. Opið er annan hvønn leygardag í mánaðinum, og her hevur tú møguleika at hitta onnur foreldur, ið hava mist eitt barn.

## 85 ára føðingardagur

Týsdagin 9. november fyllir Harry Johansen, Lamba 85 ár. Hann verður burturstaddur.

## Gullbrúdleyp

Í dag, 6. november kunnu hjúnini Ingibjørg og Poul Nolsøe Mikkelsen, Klaksvík halda gullbrúdleyp, tey eru stødd hjá dóttrini á Argjum, har opið hús er frá kl. 16.00. Adr.: Reynstún 31, Argir.

Í dag, 6. november, hava hjúnini Una og Hjørleif Hentze Tórshavn, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

## Silvurbrúdleyp

Gurðið og Hugo Johannesen hava verið gift í 25 ár. Adr.: Forum Kirkevej 8, Brøndum, 6715 Esbjerg N.

### Brúdleyp

Leygardagin 30. oktober *giftust* í prestagarðinum í Kvívík Joan Skorðheim og Ingi Næs Rasmussen.

Í dag, 6. november, giftast í Esbjerg Kristine Emig, Esbjerg og Arni Weihe, Hósvík, sonur Johan Weihe, Funning og Herdis Weihe, Strib, Fyn. Brúdleypsadr.: Matrosvænget 93, Hjerting, 6710 Esbjerg.

Í dag, 6. november, kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Birta Biskopstø, Klaksvík og Jógvan Elias Winther Poulsen, Hoyvík.

## Prógv

Hervør Skála úr Tórshavn, sum býr í Hellevad hevur lokið prógv sum kokkur frá Tekniske skolen í Åbenraa.

2. november fekk Halldis Müller, Hvalba, prógv sum Professions Bachelor við Gladsaxeseminariet í Keypmannahavn.

## Tummas Joensen sjeyti



Mánadagin 8. november fyllir Tummas Joensen, Slættalíð 12, Tórshavn 70 ár. Tummas er nólsoyingur, foreldrini vóru Valborg og Jógvan í Heiðriksstovu í Nólsoy. Tey góðu barnaárini átti Tummas í heimbygdini, og tá skúlin var frá hondini fór hann, sum so mangur unglingi, til skips. Í 1961 fekk hann skiparaprógvið á Føroya Sjómansskúla, og fór hann tá at sigla hjá DFDS sum stýrimaður, til hann í 1967 kom heimaftur, tá hann fór at sigla sum stýrimaður hjá Skipafelagnum, síðan fór hann í starv á Majarinum. Sigldi síðan eitt skifti í danska farmaflotanum og var eisini nøkur ár á Bacalao.

Tummas er hegnismaður og serligi hugur hansara til sjógvin hevur ligið frammalaga, hann er veiðimaður burturav, um tað so er til bjarga, og mangan hevur hann sitið við fleygasessin í Nólsoy og í Koltri. Javnan er hann á báti og »Prestur« hevur fastan »sess« við bátabrúgvarnar í Vágsbotni. »Prestur« og Tummas hava ført manga veiðina til lands, mangan fongin landar hann til uppboðssøluna inni á Toftum, hansara partur liggur so ikki eftir í strembanini at bjarga virkjum okkara rávøru.

Fýra vóru børnini hjá Rannvá og Tummas, og barnabørnini somuleiðis 4. Hóast svárandi sorgina, tá tey mistu sonin Gudmund í 2003, hava Rannvá og Tummas átt megina og dirvið framhaldandi at mynda sær gerandisdagin. Vit biðja eftir, at soleiðis eydnast framhaldandi. Tillukku við teimum 70.

**j.**

## Óli Olsen signerar nýggja bók á Sjómansskúlanum

**Í dag, leygardagin 6. november, verður hugnaløta á Føroya Sjómansskúla í samband við at Óli Olsen signerar nýggju bókina "Sigling og útbúgving II". Hetta er seinna bókin, ið hann hevur skrivað um sigling og útbúgving í Føroyum**



*Óli Olsen við nýggju bókini " Sigling og útbúgving II", sum hann signerar á Føroya Sjómansskúla í dag 6. november frá kl. 15-17. Bókin er 267 blaðsíður*

Síðan 1. januar 2000 hevur Óli Olsen, sjómansskúlalærari, arbeitt burturav við at skriva tvær bøkur um sigling og útbúgving. Fyrra bókin "Sigling og útbúgving I" kom út í 2003, og nú kemur seinna bókin "Sigling og útbúgving II" út.

Meðan fyrra bókin fevnir um tíðina frá landnámi til 1927, tá ið stýrimansskúli varð settur á stovn í Føroyum, byggir seinna bókin á fyrru bókina og fevnir um tíðina frá 1927 til aldamótið 2000.

Í Havn vera stýrimansskúli og longdarútbúgving sett á stovn í 1927 og motorskúli annað árið eftir. Klaksvíkar Sjómansskúli fór at læra setuskiparar í 1947. Í 1949 koma útbúgvingarnar á føroyskar hendur, og í 1962 flytur Føroya Sjómansskúli niðan á høvdina – í núverandi høli

Umframt yvirlit yvir sjómansskúlanæmingar er eisini fullfíggjað yvirlit yvir lærarar og starvsfólk á sjómansskúlanum.

Óli Olsen er klaksvíkingur. Hann er føddur í 1949 og vaks upp í einum umhvørvi, har tosið mangan fall á útróður, fiskiskap og sigling.

Sum ungur var hann á floti saman við abbunum báðum í Árnafirði og í Klaksvík.

Soleiðis varð støði lagt undir komandi sjómanslív.

Eftir lokið realprógv í 1966 fór hann til skips, og tá ið hann hevði tikið skipsføraraprógv í 1973, fór hann út at sigla.

Óli tók læraraprógv í Havn og var lærari á Føroya Sjómansskúla frá 1987-2000.

Nú hann er liðugur við at skriva bøkurnar, er hann farin út í vinnuna aftur.

## Dagurin

**6. november. Leonhardus**, deyður umleið ár 570. Munkur og trúboðari í Fraklandi. Hann legði ikki í at vera valdur til biskup. Kundi øll lás og allar leinkjur at loysa og gjørdist verndarhalgimenni hjá lásasmiðum og fangum.

Navnið er týskt og merkir *leyva* og *harður*.

**7. november. Engelbrekt**, deyður í 1225. Týskur munkur, sum longu 30 ára gamal gjørdist erkibiskupur í Köln. Sum kirkjuploitikari tók hann sær fyri at bøta um mong viðurskifti, sum vóru farin av lagi. Fekk, sum vera man, nógvar fíggindar, sum gingu saman í ráð og myrdu hann.

Navnið er týskt, kemur av fólkaslagnum *anglar* saman við orðinum *bjartur*.

**8. november. Claudius**, deyður umleið ár 300. Steinhøggari, sum saman við fýra øðrum steinhøggarum altíð risti kross í tey arbeiði, hann legði úr hondum. Tá ið hann og felagar hansara noktaðu fyri at høgga myndir av skurðgudum, læt keisarin Diocletianus teir taka av døgum.

# ítróttur

Nr. 213 • leygardagur • 6. november 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## GÍ hevur fingið pappír uppá Súna



*Áhugin fyri ársins leikara hevur verið stórur frá fleiri feløgum. Men nú hevur GÍ so fingið pappír upp á Súna Olsen fyri enn eitt kappingarár*

**Gøtumenn eru trúgvir móti GÍ, har tey nú vóna, at veteranarnir Magni Jarnskor og Sámal Joensen næsta ár fara at hjálpa ungu monnunum**

GÍ FYRIREIKING
*Jóannes Hansen*

So er tað svart upp á hvítt. Hóskvøldið skrivaðu GÍ og Súni Olsen undir sáttmála, sum sigur, at ársins spælari 2004 eisini næsta ár fer at umboða barndómsfelagið í Gøtu.

Súni Olsen váttar, at fleiri feløg hava spurt seg fyri, og hann sigur seg vera fegnan um, at tað nú er greitt, at hann fer at halda fram í Gøtu:

– Eg havi havt tað gott í GÍ. Spælskipanin var góð fyri meg síðsta kappingarár, og eg haldi, at tað eru góðir møguleikar fyri menning í liðnum, sum spældi í ár. Sáttmálaskeiðið er eitt ár. Eg verði liðugur í handilsskúlanum í summar. Hvussu tað verður, tá ið næsta kappingarár verður liðugt, dugi eg ikki at siga. Eg havi ikki slept møguleikanum at spæla uttanlands, men um tað skal verða veruleiki, so skal talan verða um góða ítróttarliga avbjóðing og annars eitt gott tilboð, sigur Súni Olsen.

Jógvan Gregersen, formaður í GÍ, fegnast um, at Súni hevur gjørt av at halda fram í Gøtu:

– Eg hevði altíð roknað við hesum. Gøtudreingir eru ógvuliga trúgvir móti okkara felag. Eingin, sum er uppvaksin í Gøtu, er enn fluttur úr Gøtu og í annað føroyskt felag. Tað eru vit fegnir um.

*Er so alt komið upp á pláss undan næsta kappingarári?*

– Vit hava ikki tosað við allar spælararnar enn. Tað er greitt, at Popczynski verður venjari, at Meinhardt Joensen verður málverji, og nú er greitt, at Súni verður á liðnum. Tá ið vit nú hava fingið hetta upp á pláss, er tað lættari at tosa við hinar, sum sjálvandi fegnir vilja vita, hvørjir liðfelagarnir fara at vera.

*Ætla tit at fáa fleiri nýggjar spælarar til felagið?*

– Í løtuni hava vit ikki ætlanir um hetta. Spælararnir hava seinastu vikurnar verið á vøllinum tvær ferðir um vikuna. Magni Jarnskor hevur verið nógv á vøllinum. Hann hevði ikki umstøður at brúka so nógva tíð upp á fótbóltin síðsta kappingarár. Nú liggur betri fyri, og tað hevði verið hugaligt, um hann hevði komið orduliga fyri seg aftur. Sámal Joensen hevur verið á sjónum síðstu árini. Nú verður hann heimamaður. Hann hevur ikki enn verið og vant, men vit vóna og rokna við, at hann fer at taka fótbóltin í stórum álvara. Um teir báðir veteranarnir koma fyri seg aftur, so verður hetta sera góður styrkur hjá ungu monnunum, sum seinastu tíðina hava fingið royndir á besta liðnum, heldur Jógvan Gregersen, formaður í GÍ.

## Seinni dysturin skal spælast

**Kappingarnevndin hjá FSF avgjørdi hóskvøldið, at seinni dysturin millum SÍF og MB skal spælast. Men MB verður kortini revsað fyri atburðin**

SÍF-MB
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóskvøldið hevði kappingarnevndin hjá FSF fund, har millum annað málið um dystin millum SÍF og MB var á skránni.

Hetta hevði kappingarnevndin tikið upp av sínum eintingum. Sambært grein 38 í kappingarreglunum hevur FSF loyvi til hetta, um illgruni er um, at lið hevur borið seg óregluliga at í kapping.

Sum skilst, so var talan um ein hampuliga drúgvan fund, har nógvir møguleikar vórðu havdir á lofti. Endin á øllum var, at seinni dysturin millum SÍF og MB skal spælast, men nøkur óvanlig stig eru tikin fyri at tryggja, at hetta verður gjørt undir ítróttarligu røttu fortreytunum.

Møguleikarnir, sum FSF hevði í so máta, eru nevndir í kappingarreglunum, og vóru hesir: Felagið kundi fáa ávaring, bót, verða dømt at tapa dyst, dømt at missa heimavøll í ein ella fleiri dystir ella verða koyrt úr kappingini.

Og eftir at hava viðgjørt málið, gjørdist niðurstøðan hjá FSF soljóðandi: FSF staðfestir, at 3-0 sigurin hjá SÍF stendur við. Somuleiðis staðfestir FSF, at seinni dysturin millum feløgini skal leikast, men at hesin skal spælast í Sandavági. Hetta tí MB verður frádømt rættin til heimavøll. Eisini fær MB eina bót áljóðandi 5.000 kr.

Hartil verða feløgini biðin um, at tey í seinasta lagi fríggjadagin kl. 17.00 skulu lata FSF dómaraseðlar til dystin leygardagin. Hetta so umsitingin fær tryggjað, at leikararnir, sum ætlanin er at nýta, er lógligir sambært leikarayvirlitinum, sum FSF hevur latið feløgunum.

Og at enda verður staðfest, at Fótbóltssambandið fer at hava umboðsmann við vøllin, tá seinni dysturin verður leiktur. Hesin skal tryggja, at dysturin fer fram undir røttu ítróttarligu fortreytunum, og hevur umboðsmaðurin fulla heimild at ógilda dystin, um framferðin ikki er í samsvar við ásetinginar, sum FSF hevur sett út í kortið.

Vit hava roynt at fáa eina viðmerking frá Bjarka Mohr, formanni í kappingarnevndini, men hesin var tó ógvuliga fáorðaður.

– Vit vilja bara tryggja okkum, at hetta verður avgreitt undir røttu ítróttarligu fortreytunum. Samstundis hava vit avgjørt, at SÍF ikki skal revsast, tá hin parturin hevur bortið ásettu mannagongdirnar. Tí hava vit valt ikki at broyta sjálvt úrslitið av dystinum, staðfestur Bjarki Mohr at enda.



*Hóskvøldið var málið um dystin millum SÍF og MB á fundarskránni í FSF-húsinum. Niðurstøðan er, at seinni dysturin skal spælast, men tað verður í Sandavági. Hartil fær MB bót, eins og greiðar treytir eru ásettar til seinna dystin*